VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 12 og 15 stig



Veðrið leygardagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur, men seinnapartin lækkar hann niður í sunnan og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.



Veðrið sunnudagin:
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 14 og 17 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin lot av ymsum ættum og ælingur, týsdagin upp í strúk í vindi av útsynningi og regn. Hitin millum 14 og 18 stig.

DAGSINS FERÐAFÓLK

"Føroyar eru eisini ein partur av verðini"

Tvørámanninum Paula Einarsson dámar væl fótbólt. Hann er til hvønn einasta dyst hjá TB, og væntar at Frakland gerst heimsmeistari í fótbólti. Annars er hann stjóri í Oil Spill Response í Føroyum og býráðslimur á Tvøroyri.

Snorri Brend

- Stórar avbjóðingar standa fyri framman, tá talan er um oljuvinnuna í føroyskum øki, sigur Pauli Einarsson

Fert tú uttanlands í summar?

- Nei, ikki í ár. Møguliga fara vit onkran stuttan túr í Føroyum. Í summar fari eg at takast við ymiskt arbeiði heima við hús.

Leygardagin kemur ein oljuboripallur til Føroyar. Hvat er hetta tekin um?

- Hetta er eitt sera áhugavert stig. Hetta vísir, at áhugin fyri okkara øki er aftur vorðin stórur, og at tey stóru oljufeløgini hava vónir um at finna olju her.

Hvat gert tú í frítíðini?

- Mær dámar væl at spæla guittara, men tað er bert til húsbrúks. Eg hevði kortini ikki væntað, at alt Føroya fólk skuldi fáa hetta at vita gjøgnum Sjónvarp Føroya (he-he). Annars eri eg saman við familju og vinum.

Hvør verður heimsmeistari í fótbólti?

- Tað er ringt at siga, men eg vænti at Frakland vinnur á Italien. Teir eru meiri skipaðir nú enn tá kappingin byrjaði. Tí vinna teir sunnudagin.

Hvørjum vilt tú heilsa?

- Familju, vinum og kenningum. Og so vil eg eisini ynskja Statoil-samtakinum góða eydnu við oljuboringini í summar. Eg vóni at alt gongur sum tað skal – og uttan nakað óhapp!

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	--
Nuuk	10
Qaqortoq	8
Ammassalik	5
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	11
Seyðisfjørður	10
Tórshavn	11
Lerwick	13
Aberdeen	14
London	28
Tromsø	--
Bergen	20
Oslo	--
Stokkhólm	26
Keypmannah.	26
Helsinki	21
Moskva	25
Berlin	27
Warzawa	26
Kiev	24
Bukarest	26
Paris	31
Madrid	29
Róm	30
Malorca	29
Athen	25
Malta	30
Tunis	31
Beijing	34
New Dehli	34
Bangkok	32
Jakarta	32
Sydney	16
New York	32
Miami	29
Los Angeles	24
Meksikobýur	22
Panama	30
La Paz	13
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	19

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt lágtrýst, 997 hPa. yvir Íslandi fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið vestan fyri Føroyar fer eystureftir.



Í dag:
Lágtrýstið norðan fyri Føroyar fer í landnyrðing og brúgvalagið eystan fyri Føroyar hvørvur eystureftir.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 4/7 kl. 06^{00}– 5/7. 06^{00}. Hitin í gjár: 11,1°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í apríl: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0 mm – mált frá 4/7 kl. 06^{00}– 5/7 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í apríl: 12 mm

Sosialurin

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

GEVIÐ BLÓÐ

VESTFALLSKYRRINDI

4. juli Jørðin longst frá sólini
11. juli Fullmáni
13. juli Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
6. Juli	03.25	15.45	02.25	14.45	02.40	15.00	05.25	17.45	06.25	18.45	01.40	14.00	00.40	13.00	03.40	16.00	04.40	17.00	03.10	15.30	04.25	16.45
7. Juli	04.06	16.29	03.06	15.29	03.21	15.44	06.06	18.29	07.06	19.29	02.21	14.44	01.21	13.44	04.21	16.44	05.21	17.44	03.51	16.14	05.06	17.29
8. Juli	04.52	17.19	03.52	16.19	04.07	16.34	06.52	19.19	07.52	20.19	03.07	15.34	02.07	14.34	05.07	17.34	06.07	18.34	04.37	17.04	05.52	18.19
9. Juli	05.46	18.13	04.46	17.13	05.01	17.28	07.46	20.13	08.46	21.13	04.01	16.28	03.01	15.28	06.01	18.28	07.01	19.28	05.31	17.58	06.46	19.13
10. Juli	06.37	19.05	05.37	18.05	05.52	18.20	08.37	21.05	09.37	22.05	04.52	17.20	03.52	16.20	06.52	19.20	07.52	20.20	06.22	18.50	07.37	20.05

5 707265 100050 >